## DAGSINS MEINING

# Fullveldið inn gjøgnum bakdyrnar

Valstríðið hjá øllum flokkum snúði seg um at betra um støðuna hjá skúlaverkinum, hjá teimum veiku og sjúku, teimum gomlu osfr. Allir flokkar løgdu upp til, komu teir í Tinganes, at pengar skuldu brúkast til at menna tænastur og samfelagið sum heild. Hetta er tó ikki tónin, ið lagdur verður upp til frá tjóðveldisblaðnum Fregnum, tí sambart blaðnum skal fíggjarmálaráðharri Tjóðveldisfloksins nú av álvara til at tryggja, at føroyska samfelagið verður sjálvberandi ikki í 2012 men um fýra ár. Rekast skal ein strangur búskaparpolitikkur og skal Karsten Hansen ikki verða nógv uttanduraður næstu árini, tí annars tysja mýsnar uppá borðið og leppa troðini tóm. Ein margháttlig samanbering, tá hugsað verður um, at mýsnar í veruleikanum eru tey ungu, sum skulu hava heimsins besta skúla, tey sjúku og veiku, ið skulu hava eitt betri heilsu- og almannaverk, tey gomlu, ið skulu hava hægri pensión og betri umstøður og tey skapandi listafólkini, ið skulu hava betri kor at virka undir. Troðið er sjálvandi landskassin. Her rakar málgagnið hjá Tjóðveldisflokkinum í plett. Og avdúkar bæði egnan og floksins hugburð og holdning til nettupp tey ungu, sjúku og veiku og tey gomlu.

Teir pengar, sum flokkarnir, eisini Tjóðveldisflokkurin, vildu brúka undir valstríðnum til umrøddu menning, skulu nú undir lás og goymast, so Tjóðveldisflokkurin um fýra ár kann útrópa republikkina: kassin er fullur, Føroyar hava fingið sín sjálvberandi búskap, nú er at kvetta. Men so lætt spælir klaverið heldur ikki. Tí aftur her eins og við fullveldistøkuni hjá Tjóðveldisflokkinum eftir síðsta val, fer flokkurin at sanna, at fólkið fer at venda sær ímóti hesum stuldri av fólksins ognum. Tær hendur og tey høvd, sum skapa virðini í dag, vilja so sanniliga eisini eiga lut í hesum virðum. Tí fer strangi búskaparpolitikkurin hjá Karsteni, skal hann verða súlan undir fullveldinum um fýra ár, at vera ein boomerangur. Hinvegin eru hetta í veruleikanum tóm orð. Tjóðveldisflokkurin spælir dupultspæl. Hvussu kann Karsten sita fast á kassanum, samtíðis sum Annlis og Páll skulu hava nógvar pengar til at marknaðarføra seg og síni øki!

So tá Hoydal sigur, at samgonguskjalið er soltið, tá tað um fullveldi ræður og samtíðis sigur, at tað, sum man tá ikki fær við skjalinum, má man vísa í verki í politikkinum, má hetta vera ein ávaringarklokka hjá teimum hóvligu. Tað er greitt, at Hoydal fer at gera alt hann kann fyri at fáa fullveldið inn gjøgnum bakdyrnar tvs. at fáa tað framt í verki í sínum fýra landsstýrisráðum. Trupulleikin hjá honum verður so bara at vita, hvussu tað ber til at menna økini, eitt nú skúla og mentan, uttan at taka pengar úr fullveldiskassanum hjá Karsteni.

Fyrr at tað loysing. Síðani bleiv tað til skipað loysing. So til fullveldi. Nú eitur tað fult sjálvstýri. Hvat verður tað næsta! Jú til næsta valstríð verður tað helst fult og endaligt fullveldi. Vit fáa at síggja.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ráðharrar við ongum og abort

**Heri Mohr**



At tey ríku oljulondini: Saudi Arabia, Kuwait o.o. hava oljumálaráðharrar ella aðra skipan, ið kann sammetast við nevnda ráðharraheiti, er eingin ivi um, men um okkara leiðir t.d. í Danmark, sum er oljuframleiðandi land, vita vit lítið ella einki um fyribrigdið ráðharri við oljumálum burturav. Og kortini!

Í einum minni oyggjaflokki í Atlantshavinum á 62/6.5o stigum eru aðrar og størri dimentiónir, tí hetta lítla samfelagið hevur í meira enn 4 ár Guinnessmet við at hava oljumálaráðharra við ongari olju, og metið verður kanska ikki minni skemtiligt komandi 3 árini.

Og nú er so eitt annað kuriosum komið fram í ljósið: Sprænnýtt lógmálaráð /justitsministerium) er sett á stovn óivað við embætum, størvum og annað hartil hoyrandi at fyrireika yvirtøkur av dómsvaldi við trimum instansum og løgregluvaldi. Altso, eitt ministerium við ongum lógum.

Hava menn gloymt ministeriið til okkara fólkakirkju, er hon ikki, um vit so kunnu siga, meira aktuel enn olja, dómhús og gegl? Eiga vit ikki onkran ambitiøsan, væl skikkaðan prest og onnur tignarfólk at manna eitt kirkjumálaráð? Og hvussu við øðrum raðfestum yvirtøkum, er alt hetta gloymt?

– Eingin neyð, tað magiska talið 10 verður stóri pottur: Ráðharri uttan portefeuille, segði ein skemtari, kanska beinrakið.

Ráðharrar við fiktivum málsøkjum, lat tað so fara. – Látur sigst at vera stimbrandi fyri ta góðu heilsuna, men í hesum føri er hann – láturin – dýrt keyptur.

Tað er ikki heilt burturvið at siga, at vit hava fingið áttati árini umaftur við sama góða handalagi, men í øðrum líki. Tær mongu lógirnar um almenn veðhald og lán úr landskassanum eru allar skrottaðar, – men hvussu er tað nú, at állurin málber seg á donskum?

Ikki øðrvísi, men meira skelkandi fingu vit nú ein dagin at vita frá okkara nýklakta heilsumálaráðharra, at hann kudni hugsað sær at farið í journalirnar á okkara sjúkrahúsum fyri at skráseta har framdar abortir og soleiðis eisini sneytað í okkara mest privatu viðurskiftum.

Heilsustimbrandi láturin innblástur av oljumálaráðnum og lógmálaráðnum bráðtagnaði.

Hetta, at ein politiskur myndugleiki umhugsar at fara í stongdar journalir á sjúkrahúsum, má haldast at vera so álvarsligt brot á alla mannavirðing og sømiligheit, at í framkomnum londum hevði ein slíkur persónur ætlandi fingið sessin skriktan undan sær í somu løtu, orðini um at snata í sjúkrahúsjournalum vóru komin yvir hansara munn.

Abort úti á Tinganesi er kanska ikki óhugsandi? Journalin er sjálv- og kunngjørd.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum mongu,
ið sýndu samkenslu, tá ið kæra mamma okkara

**Poulina Mikkelsen**
Fuglafirði

andaðist og varð jarðað.

Ein sertøkk til tín, sum var um hana
tað seinastu tíðina,
meðan hon lá á Ríkissjúkrahúsinum.

Tøkk fyri blómur, kransar, telefonuppringingar
og gávur.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, gravarar
og berarar.

Tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til
við jarðarferðini.

Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Petur, Poul og Johannes**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi,
tá kæri maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Petur Pauli Mikkelsen**
Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Leguhúsið í Nesvík. Tøkk øll somul.

*Vegna tey avvarðandi*
**Trinemia**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




Henrik Old:

# Almennir pengar skulu til

**Eftirspurningurin er lítil, og fólkagrundarlagið er ikki til staðar. Tí er flogferðslan millum londini í Útnorði so avmarkað, siga flogfeløgini. Tí má tað almenna vera til reiðar at seta pening í vága, annars spyrst einki burturúr, sigur Henrik Old. Tað almenna fer ikki at veita stuðul, sigur Bjarni Djurholm harafturímóti**

SAMFERÐSLA
*Stefan í Skorini*



*Henrik Old úr Javnaðarflokkinum vil fegin brúka almennar pengar at stimbra samferðsluna í Útnorði. Hann er tískil ósamdur við landsstýrismannin, sum als ikki vil hoyra talan um almennan stuðul*

Breið semja er um, at flogferðslan millum londini í Útnorði ikki er nøktandi. Ov fáir túrar eru millum londini, og fleiri rutur áttu at verið stovnaðar. Hetta halda fleiri av luttakarunum á ráðstevnuni um samferðslu í Útnorði. Serliga var tað rutan millum Ísland og Grønland, sum saknur var í.

Flogfeløgini siga, at tey einki taka sær fyri, uttan at tað gevur yvirskot. Tað er torført at fáa eina slíka rutu at bera seg, og tí er hetta ikki ein møguleiki, sum ferðafólk hava.

Ósemja er tó millum politikararnar um, hvussu hetta málið skal loysast, og hvussu samferðslan millum londini skal stimbrast. Her er stríð millum hugsjónir.

### Ongan stuðul

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við samferðslumálum, helt fyri, at tann tíðin er farin, tá tað almenna lat vinnurekandi fyritøkum stuðul á ein ella annan hátt. Alt skal rekast á vinnuligum grundarlagi, og tað mugu flogfeløgini syrgja fyri.

Hann legði dent á, at landsstýrið ikki ætlaði sær at veita flogfeløgum ella Smyril Line stuðul til slík endamál.

– At veita stuðul bítur seg sjálvan í halan. Tað má rekast á vinnuligum grundarlagi, og alt slag av beinleiðis stuðli kemur als ikki uppá tal, segði landsstýrismaðurin. Talan er her um millumlanda ferðasamband, tí ferðasambandið innanlands verður ikki rikið á vinnuligum grundarlagi.

### Old ósamdur

Henrik Old, tinglimur fyri Javnaðarflokkin, er als ikki samdur við Bjarna Djurholm. Hann heldur, at tað almenna skal vera tilreiðar at brúka pening fyri at stimbra samferðsluna millum londini í Útnorði.

– Um vit ikki vilja nýta pening í hesum málinum, so kunnu vit spara okkum ómakin. Eg eri ikki bangin fyri at nýta einar tríggjar ella fýra milliónir úr landskassanum, um tað er til eitt gott endamál, hóast møguleiki er fyri, at tær fara fyri skeytið. Um vit ikki stuðla koma vit ongan veg, segði Henrik Old á ráðstevnuni um samferðslu í Útnorði.

Hann nevndi í tí sambandi, at landið eigur allan partapeningin í Atlantic Airways í dag, og hetta felagið hevur góðar dagar. Eisini vísir hann á, at Smyril Line upprunaliga var eitt alment projekt, sum síðani gjørdist privat.

Hann vil vera við, at um politikararnir vilja hava eina rutu til Grønlands, so mugu teir brúka almennar pengar.

Politikararnir eru tí ósamdir um, hvussu hesi málini skulu loysast. Henrik Old úr Javnaðarflokkinum er fúsur at stuðla úr landskassanum, meðan Bjarni Djurholm sigur kortanei.

# Rendi í tunnilsveggin

**Ein persónbilur við tveimum ungum monnum rendi beint eftir middag inn í veggin inni í Leirvíkartunlinum. Álvarsligur mansskaði hendi ikki**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Leirvík:** Í bilinum, sum var á veg til Leirvíkar, vóru tveir ungir dreingir, sum báðir vórðu fluttir á Landssjúkrahúsið beint eftir óhappið. Sum skiltist sluppu teir merkiliga væl frá hendingini, meðan bilurin varð vrak.

Tað hevur ikki borið til at fingið at vita nakað nærri um umstøðurnar, tí eingin á Politistøðini í Runavík sigur seg vita stórvegis meira um málið enn tað, Sosialurin frætti, tá vit komu framvið, beint eftir at bilurin hevði rent inn í tunnilsveggin.

Tó skilst, at rúsdrekka hevur ikki verið uppií, meðan annars er eitt sindur ógreitt, hvat veruliga hendi.



# Kappríðing við Leynavatn



**Árliga kappríðingin við Leynavatn verður í dag. 48 ross luttaka, og eitt teirra kann við at vinna í dag, vinna ferðasteyp til ognar**

KAPPRÍÐING

Árliga Leynavatnskappríðingin byrjar í dag klokkan 15.00. 48 ross luttaka í kappríðingini, og kappast verður um ferðasteyp, sum Føroya Sparikassi hevur latið. Eisini verður kappast um steyp, sum ÍSF hevur latið til FM kappingina. Kappingin við Leynavatn er onnur FM kappingin í ár.

Ferðasteypið frá Sparikassanum varð fyrstu ferð kappast um í 1996. Reglurnar eru tær, at tað rossið, sum klárar at vinna steypið tríggjar ferðir í einum fimmáraskeiði, eigur tað til ognar.

Í ár hevur Lokkur hjá Rólanti Reinert í Havn hendan møguleika, tí hann hevur vunnið bæði í 1998 og 2000.

Sum vera man er eisini okkurt at fáa til keyps á eini stlíkari stevnu so sum kaffi og køkur og okkurt leskandi til børnini.

*ej*

# Kópur og nísa og toskur og hýsa

**Á stóru framsýningini um veiðimentan í Útnorði, sum letur uppí Norðurlandahúsinum um vikuskiftið, verður alt frá veiðidjórum til framtíðar tøknifrøði, sum nýtt verður í nútíðar veiðimentan, at síggja**

FRAMSÝNING
*Edvard Joensen*

Stórfingin framsýning um veiðimentan í Útnorði letur upp í Norðurlandahúsinum í dag klokkan 15.00. Framsýningin er opin mánaðan út.

Framsýningin umfatar alt, sum hevur við bæði gamla og eisini komandi veiðimentan í útbnorði at gera.

Vit síggja ein eftirgjørdan grindahval, sum saman við øðrum djórum á framsýningini umboðar tey djór, veidd hava verið, so leingi fólk hevur búð í umráðnum.

Vit síggja millum annað eina grønlendska kajakk, sum umboðar tey amboð, hesi fólkini hava brúkt til at veiða sær djór til lívsins uppihald.

Og vit síggja eins hátøknifrøðiliga íslendska flow linju, sum umboðar ta komandi veiðimentanina, har maskinurnar hava tikið yvir starvið við at viðgera tað, veitt verður á okkara døgum.

Framsýningin er listaliga sett upp, soleiðis at tann vitjandi fær varhugan av at ferðast í umhvørvinum, sum hon skal vísa. Tað er listamaðurin Edward Fuglø, sum hevur staðið fyri tí partinum.

Framsýningin komin í lag av einum útnorðursamstarvi millum teir tríggjar partarnar, Grønland, Ísland og Føroyar. Fyrireikingarnar hava staðið við í trý ár, til nú latið verður upp.

